Skipaeftirlitið
Faroese Maritime Authority

# Søkt verður eftir Skipaeftirlitisfólki

**Talan er um eitt farloyvisstarv í tíðarskeiðinum frá 1. juli 2009 til 30. juni 2010.**

**Starvið er í høvuðsheitum skrivstovuarbeiði/málsviðgerð og inniber m.a. hesar upppgávur:**
- Málsviðgerð í samband við umbyggingar og nýbyggingar
- Málsviðgerð og uppfylging av sýnum.
- Luttaka í tvørgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum
- Kanning av vanlukkum á sjónum.
- Sýn av bátum og skipum.

**Útbúgvingarkrav**
Til starvið krevst ein av niðanfyri nevndu útbúgvingum:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur, sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- skipsførari við sjóvinnubrævi STCW II/2

**Førleikakrøv**
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur starvsroyndir innanfyri viðkomandi øki og hevur kunnleika til dygdarmenning, ISM, ISO 9001 ella tangaskip.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2009, kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Jákup K. Poulsen, samskipara ella Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:
**Skipaeftirlitið, Postsmoga 26, FO-370 Miðvágur**

**Skipaeftirlitið**
Postsmoga 26 · 370 Miðvágur · Telefon 35 56 00
Telefax 35 56 01 · E-mail: fma@fma.fo

HANSEN § THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

# Næmingur til advokatskrivstovu

Søkt verður við hesum eftir næmingi til advokatskrivstovu okkara, at byrja í summar.

Umsøkjarin má hava lokið HH-prógv ella tilsvarandi miðnámsútbúgving. Næmingar sum vænta at verða lidnir við útbúgving sína í summar, eru eisini vælkomnir at søkja starvið. Hollur kunnleiki til skrivligt føroyskt og danskt er ein avgjørd fortreyt fyri at verða settur.

Uppgávurnar fevna um at skriva fyri advokatarnar á skrivstovuni, inkassovirksemi, bókhald o.a.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert og mennandi arbeiði við fjølbroyttum arbeiðsuppgávum.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til skrivstovuna.

Umsóknarfreistin er til tann 25. mai 2009. Umsóknirnar, sum skulu vera skrivligar og við próvskjølum o.ø., verða at senda til:

**Hansen & Thomassen Advokatfirma**

Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106 · 110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595 · fax: (+) 298 359596
advokat@advokat.fo · www.advokat.fo

**Annfinn V. Hansen, adv. (H)** annfinn@advokat.fo
**Djóni Thomassen, adv. LL.M.** djoni@advokat.fo
**Rannvá Ragnarsdóttir, adv. mediator** rannva@advokat.fo
**Jens Andrias Vinther, adv.** jav@advokat.fo

ADVOKATGARÐURIN
Julianna Klett
Bringsnagøta 21
Postboks 62
110 Tórshavn
Telefon (298) 311744
Telefaks (298) 318844
Avgreiðsl. Kl. 10-16 mán.-frí.
e-mail:klett@post.olivant.fo

# Bilur til sølu

Ein Mazda B-2500, diesel til sølu. Bilurin er frá 2001 og hevur einans koyrt 43.000 km.

Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge, advokat á tlf. 31 17 44 ella umvegis teldupost á lamhauge@klett.fo

**ADVOKATGARÐURIN**
**Bringsnagøta 21, Tórshavn**
**tlf. 311744, avgr. tíð: má.-fr. kl. 10-16.**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

HANSEN § THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

# Til sølu

Fyri konkursbúgv verða hesir lutir lýstir til sølu:

- Rakstrargøgn tilhoyrandi Sp/f Merlot í konkurs. Talan er um borð, stólar, ovnar, frystiskáp, pannur, borðnýti og líknandi lutir, ið hoyra til matstovuvirksemi.
- Vøruvognur av merkinum Citroén Berlingo 2.0, árg. 2007.

Nærri fæst at vita um lutirnar við at venda sær til skrivstovu okkara:

**Hansen & Thomassen Advokatfirma**

Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106 · 110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595 · fax: (+) 298 359596
advokat@advokat.fo · www.advokat.fo

**Annfinn V. Hansen, adv. (H)** annfinn@advokat.fo
**Djóni Thomassen, adv. LL.M.** djoni@advokat.fo
**Rannvá Ragnarsdóttir, adv. mediator** rannva@advokat.fo
**Jens Andrias Vinther, adv.** jav@advokat.fo

IRF
*– heilt og reint*

**IRF hevur tveir lastbilar til sølu**

Ein MAN lastbilur, árgang 1989, við skiftilastsystemi.

Ein Scania R 113 H, árgang 1989, við skiftilastsystemi og kranalast.

Bilarnir verða seldir til hægstbjóðandi, sum teir standa við verkstaðið hjá IRF í Norðragøtu, treytað av at tilboðini eru nóg høg.

Meiri fæst at vita um bilarnar, við at venda sær til IRF, Petur Højgaard, tlf. 234254.

**IRF · Postboks 39 · 520 Leirvík**

# Flagtekju?

Norskar flagtekjur
Skjótt og ómakaleyst
Eisini hava vit nævur og torvhaldsjørn.
Ring og fá eitt óbindandi tilboð.

SJÓVINNUBÚÐIN

v/ Jákup á Lag · P.O. Boks 230 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 584020 · sjovinnubudin@kallnet.fo